# aður sangleikur






heldur konservativi lærarin, Randi Dam, sum serliga leggur dent á tann bókliga partin av útbúgvingini. Hendan leiklutin røkir hon sera væl.

### Dansur og búnar

Eitt sum ikki slepst uttanum í einum sangleiki, er dansurin. Og "Fame" er onki undantak. Jóna Kristin Thomsen hevur lagt dansin til rættis, og hetta er hon sloppin heilt væl frá. Dansararnir gera sítt arbeiði til eitt satt UG. Tað er fantastiskt at síggja dansararnir hoppa, sveima, svinga og mæla afturvið tónleikinum. Dansararnir duga so fantastiska væl, at eg sat púra paff av teirra ótrúligu evnum.

Eisini er tað ein fragd at síggja teir litríku búnarnar. Sum sagt, so gongur leikurin fyri seg í 80´unum, og vit minnast hvussu mótin var tá. Sniðgevin Anna Kristin Bæk hevur saman við seymikonunum Sólvør Jacobsen og Beintu Johannesen rakt seymin á høvdi. Vøkru og stuttligu búnarnir gera, at tú næstan droymir teg aftur í 80´ini har ið varrastiftin, stóra hári og undarligu klæðini vóru í hásætinum. Hetta er heilt stuttligt at síggja, og hava fyrireikararnir rós uppiborið fyri hetta avrik.

### Tunn søga

Søgan í "Fame" er rættiliga tunn. Uttan at avdúka ov nógv, haldi eg, at søgan verður skundað ígjøgnum leikin, og søgan hvílir ikki serliga væl. Har eru nógvar lítlar søgur í tí stóru søguni, og brádliga er søgan liðug. Leikurin endar sera brátt, og fyri meg var tað ein løgin kensla, tá ið leikararnir savnaðust fyri at taka ímóti lógvabrestum. "Er tað longu liðugt", spurdi mín síðumaður, og eg hevði hug at spyrja tað sama. Tað er ofta í sær sjálvum eitt jaligt tekin, tá ið áskoðararnir vilja síggja og hoyra meira. Men í hesum førið var tað helst av tí, at summi ikki kendu, at tey vóru komin á mál í teimum ymsu søgunum.

### Samanumtikið ein stór uppliving

Eftir mínum tykki, hevur leikurin onkrar óhepnar og veikar løtur. Men tað er ongin ivi um, at har eru nógv fleiri góðar løtur. Leikurin er serstakliga hendingaríkur, og ferðin er alla tíð høg. Leikurin er ein sannur góðbiti fyri eygu og oyru, og tey sum hava ognað sær atgongumerki til leikin, skulu avgjørt gleða seg til eina stórfingna upp-living.

Leikarar og fyrireikarar hava knossað við at fáa leikin upp at standa, og tey skulu njóta hesa løtu. Tað er forkunnugt hjá okkum føroyingum at upplivað eitt slíkt tiltak, og tískil skulu vit fagnað hendan stóra sangleik. Longu nú gleði eg meg til næsta útspæli úr Hoydølum!